## Stuðul til gransking í lagi

Føroya Havbúnaðarfelag heldur tað vera í lagi, at tað almenna veitir stuðul til gransking innan alivinnu, men felagið er ikki fyri, at tað almenna stuðlar eitt nú rognaframleiðslu. Felagið er ímóti beinleiðis stuðli í alivinnuni. Á Lívfiskastøðini í Skopun er kynsbótaarbeiði hildið uppat, men framvegis gongur lívfiskur í Skopun, og Fiskaaling selir framvegis rogn til føroyskar alarar. Nú stuðulin frá tí almenna til kynsbótaarbeiði, sum var í Skopun, ikki er meira, er eingin møguleiki hjá Lívfiskastøðini at selja rogn til kappingarførar prísir.





*- Hugskotið hjá Fiskaaling at granska í aling á streymasjógvi er ógvuliga áhugavert, heldur formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag*

luturin hjá Fiskaaling at gerast ein granskingardepil fyri alivinnuna. Hetta er sjálvsagt ógvuliga áhugavert, men flestu, sum hava eina hóming av, hvat liggur í orðinum gransking, eiga eisini at vita, at hetta tekur tíð. Soleiðis kunnu vit alarar eisini vænta, at ein tíð gongur, áðrenn vit fara at síggja nøkur ítøkilig úrslit, sum veruliga gera mun, sigur hann.

Formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag heldur, at visjónirnar, sum Fiskaaling hevur sett út í kortið, eru áhugaverdar, og hann sigur seg vóna, at góð úrslit fara at spyrjast burtur úr, sum tíðin gongur.

– Eitt sera áhugavert øki, sum vit kundu hugsað okkum, at granskarar fóru at kanna, er, hvussu tað kann umgangast, at alifiskur gerst so strongdur undir slátri. Strongdin ger, at fiskurin gerst verri, tá hann liggur hjá keyparanum.

Ragnar vísir á, at tað hevði havt stóran týdning fyri haldbari hjá okkara laksi, um granskarar funnu gongar leiðir við slátri og strongd.

– Logstikkurin hjá okkum er soleiðis, at okkara fiskur er einar tveir dagar eldri enn fiskur hjá okkara kappingarneytum, tá hann liggur á marknaðinum.

Hann sigur, at alarar kundu hugsað sær, at sláturvirksemið bleiv optimerað við tí fyri eyga at minka um strongdina hjá fiskinum.

– Tá fiskurin verður trokaður saman í sambandi við slátur, brúkar hann vøddarnar meira enn vanligt. Hetta ger mjólkasýru, ph-virði minkar, og fiskurin gerst bleytari, tá hann er sláktaður, sigur Ragnar.

### Út á streymasjógv

Formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag heldur eisini hugskotið hjá Fiskaaling at granska í aling á streymasjógvi vera ógvuliga áhugavert.

– Vit kundu hugsað okkum, at Knút Simonsen, sum fer at granska streym-og alduviðurskifti við Føroyar við sjóvarfalsorku fyri eyga, eisini hevði fingið til uppgávu at kanna viðurskiftini við aling á streymasjógvi fyri eyga, sigur Ragnar Joensen.



*Laksaprísirnir eru batnaðir í seinastuni*

# Laksaalarar fegnast um øktar prísir

**– Tað er torført at siga í løtuni, hvussu prísstøðið á laksi verður tað, ið eftir er av hesum árinum, men vit fegnast um, at prísirnir í seinastuni eru kvinkaðir uppeftir, sigur formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag, Ragnar Joensen**

LAKSAPRÍSIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Meðan føroyski feskfiskaflotin seinastu tíðina hevur drigist við sera lágar prísir á eitt nú toski og hýsu, hava føroyskir alarar merkt sær, at prísurin á laksi í seinastuni er kvinkaður nakað uppeftir.

Formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag, Ragnar Joensen, sigur við Sosialin, at besti prísur er á laksi, sum vigar eini 4-5 kilo. Er fiskurin ov stórur, lækkar prísstøðið nakað.

### Minni útboð á laksi

– Ein príshækking kemur sjálvandi væl við hjá alivinnuni, men vit høvdu vónað, at vit fóru at fáa ein uppaftur betri prís móti várinum enn teir, vit síggja í dag.

Ragnar vísir á, at meðan prísurin á aldum laksi hevur ligið niðri á umleið 20 krónum fyri kilo, er hann nú kvinkaður upp á einar 27 krónur.

– Ein orsøk til hækkandi prísirnar er, at heldur minni er av alifiski á marknaðinum í løtuni, og eitt nú úr Noregi er minni fiskur komin.

Formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag vísir á, at norska krónan hevur verið fyri nokso stórum falli undir fíggjarkreppuni, og hetta hevur ført við sær, at eitt nú føroyskir alarar ikki hava kunnað selt sína framleiðslu dýrari enn ta norsku.

– Hetta hendi seint í fjør heyst, og líka síðan tá hava vit fingið ein heldur lægri prís fyri okkara framleiðslu, enn vit høvdu vónað, tó at prísirnir eru batnaðir nakað.

### Eitt gott hálvár

Formaðurin í Havbúnaðarfelagnum sigur, at føroyskir alarar eru í teirri hepnu støðu, at fiskurin veksur væl, men hetta kann so koma aftur um brekkur – um vit so kunnu siga – tá fiskurin skal seljast, og ov stórur laksur ikki fær sama prís sum laksur, ið liggur millum 4 og 5 kilo.

Mangt bendir á, at fyrra hálvár í ár fer at vignast hampiliga væl hjá føroyskum alarum.

– Hugsandi er, at útboðið hjá norskum alarum fer at veksa aftur, men hinvegin er chilenska alivinnan í stórum trupulleikum og hevur ilt við at nøkta eftirspurningin í eitt nú USA. Tí er hugsandi, at USA fer at leita á aðrar marknaðir eftir laksi, sigur hann.

### Torført at spáa

Ragnar Joensen vísir á, at ilt er at spáa nakað endaligt um støðuna í verandi ári, tí fíggjarkreppan setir framvegis síni spor kring heimin.

– Um eftirspurningurin eftir laksi ikki fer at minka, at útboðið ikki veksur ov nógv og amerikanarar fara leita út á aðrar marknaðir, so sær árið ár bara rímiliga spennandi út.

Formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag heldur tað kortini vera torført at spáa nakað ítøkiligt um, hvussu prísstøðið á laksi verður tað, ið eftir er av hesum árinum.